# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# KRINGVARP KANN EISINI SPARA

Ein yvirskrift um dagarnar var, at »Helena ger einki við lýsingarnar í Kringvarpinum«. Víst varð til fyrispurning frá Sjúrði Skaale, sum hevur spurt hana, hvat hon heldur um, at Kringvarp Føroya gerst meira ágangandi á lýsingarmarknaðinum, og nær og hvussu hon fer at seta greiðari mørk fyri, hvussu Kringvarpið kann fara fram í kappingini móti privatu miðlunum.

Landsstýriskvinnan sigur, hetta má vera tekin um, at kappingin um lýsingarkrónurnar harðnar, og at allir miðlar seta øll segl til at tekkjast lýsarum. Hon staðfestir, at tað er eitt stríð hjá miðlum at fáa fatur á lýsingunum á sperda marknaðinum, og at hetta stríðið hevur Kringvapríð eisini.

Landsstýriskvinnan vísir til samtyktina frá 2005 um, at lýsingarnar í Kringvarpinum skulu niðurlagast yvir fimm ár. Hon vísir á, at hon fleiri ferðir hevur sagt, at so leingi sum fíggjarliga tapið av hesum ikki verður tryggjað, so gongur líkningin ikki upp.

Nú er tað so lætt at gera líkningar og so føra handilsskap og politikk út frá tí. Veruleikin er mangan ein annar hjá privatum vinnurekandi, enn hjá almennum stovnsleiðarum. Meðan privatu miðlarnir eru farnir gjøgnum eitt búskaparligt ódnarveður, har grundarlagið brádliga varð skrætt undan lýsingarmarknaðinum, so arbeiðir Kringvarpið á sama hátt. Kringvarpið er sum skattainnkrevji tryggjað. Tá lýsingarinntøkurnar ikki merkja so nógv fyri stovnin, so fær niðurgongdin ikki somu avleiðingar. Men við at útnytta ójøvnu og óróttu kappingarstøðuna, so kann Kringvarpið tryggjað seg enn betur, meðan privatu miðlarnir mugu líða.

Alt hetta hendir, tí vit hava eitt politiskt atgerðarloysi, har politikarar ikki hugsa um tað demokratiska undirskot, vit fáa, um bløðini hvørva. Í hesum døgum situr ein fjølmiðlakommissión og arbeiðir við málinum, og vónandi og væntandi spyrst okkurt gott burturúr tí.

Vit kunnu spyrja, hví skal Kringvarpið ikki spara teir pengarnar, sum mistir verða á lýsingarmarknaðinum? Hví skal ein búskaparkreppa bara ganga út yvir privatu miðlarnar, meðan Kringarpið koyrir víðari sum ein heilag kúgv?



Logikkurin átti at verið, at Kringvarpið skuldi spart, tí hví skulu tað bara vera privatu miðlarnir, sum mugu siga fólkum úr starvi og fremja grundleggjandi rationaliseringar, meðan Kringvarpið koyrir víðari og trampar á tilverugrundarlagið hjá privatu miðlunum.

Tað er ikki rætt, at tilverugrundarlagið hjá Kringvarpinum skal verða treytað av lýsingarinntøkum. Kringvarpið skal rekast við óheftum almennum pengum. Vilja politikararnir ikki játta pengarnar, so má stovnurin stutt og greitt spara.

**Tá tey privatu spara, so kann Kringvarpið eisini**

# DINERO við stórum vinningum á Rás2




Sunnukvøldið fer Rás2 undir eitt nýtt bingospæl, ið kallast DINERO. Hetta fyrsta spælið verður ókeypis hjá lurtarunum, og hava fólk longu fingið plátur sínar sendandi við postinum.

Fyri sløkum ári síðani boðaði Rás2 frá, at ætlanin var at fara undir eitt nýtt bingo. Arbeiðið er nú komið so væl áleiðis, at klokkan 19:30 sunnukvøldið verður farið undir at draga fyrstu tølini.

– Hóast krepputíðir í landinum, hevur tað gingið ótrúliga væl at fáa fyritøkur at stuðla hesum spælinum við góðum vinningum, staðfestir Birgir Waag Høgnesen, marknaðarleiðari á Rás2.

Orsøkin til hetta er, sambært Birgiri, at hesar fyritøkur vita, at Rás2 hevur ein breiðan lurtaraskara kring alt landið og í øllum aldrum.

– Tær føla tí, at tær fáa nakað afturfyri at sponsorera einum bingospæli á rásini.

Aðrastaðni á síðuni verður nevnt hvørjir vinningarnir eru hetta fyrsta kvøldið. Skipanin er samstundis hon, at tey sum fáa fulla plátu í 3. spælinum sunnukvøldið, eru við í lutakastinum um høvuðsvinningin, ið er olja frá EFFO hvør virði er 50.000 krónur.

Annars er faldari og pláta send út í hvørt húski í landinum fyrr í vikuni. Annars ber til at ogna sær fleiri plátur á sølustøðum kring alt landið.

Spælið byrjar sunnukvøldið, og verður spælt fram ímóti summarinum.

## Spæl, undirhald og vinningar

Hetta fyrsta spælið sunnukvøldið er sum nevnt ókeypis hjá fólki. Hvørt húski í landinum hevur fingið eina plátu sendandi ókeypis, og so er klárt at spæla.

Telduskráin til spælið er keypt úr Danmark og er royndarkoyrd frammanundan.

Undir spælinum fer Hilmar Jan Hansen at undirhalda, meðan funnið verður fram til tey ið vinna teir tríggjar vinningarnar fyri hetta fyrsta spælið: Gávukort frá Bowlinghøllini í Havn áljóðandi 1500 krónur; fartelefon frá Føroya Tele og ein flogferð frá Atlantsflogi.



**Siðloysi í samkomuni**

RICHARD DANIELSEN
KJAK Á SÍÐU 10



**Takið bólk 5 upp til nýggja meting**

MORTAN JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 10

# Hugsa fram í tíðina

Leygardagurin 16. apríl verður ein serstakur dagur fyri prentsmiðjuna "Føroyaprent".

Klokkan 13 fer fyritøkan undir átakið "Føroyaprent plantar trø". Ætlanin er at planta tey fyrstu 200 trøini við Viðarlundina í Kerjum við Hotel Føroyar, og samstundis gera eitt lítið hátíðarhald á staðnum. Borgarstjórin, Heðin Mortensen fer at planta tey fyrstu trøini.

Fyritøkan ætlar tó meiri enn bert hesa plantingina. Øll, sum keypa prentlutir frá Føroyaprent, líka frá visitkortum og faldarum til bløð og bøkur, verða nú eisini eigarar av hesi viðarlundini. Endamálið er, at virðingin, sum prentsmiðjan hevur fyri trøum og náttúru, verður sjónligari.

– Vit ivast ikki í, at eftirspurningurin eftir umhvørvisgóðkendum vørum fer at vaksa komandi árini. Fleiri og fleiri vilja nú hava umhvørvisgóðkendar og burðardyggar vørur, og ongin kann steðga hesum vaksandi kravinum, verður sagt úr Føroyaprent.

Føroyaprent er einasta svanamerkta fyritøka í landinum, og hevur longu prógvað virði í norðurlendsku svanagóðkenningini. Í dag eru uml. 90% av øllum prentlutum frá Føroyaprent svanamerktir, sum merkir, at alt pappírið, ið verður brúkt til prentlutir, kemur úr norðurevropeiskum skógum, har størstu fyrilit verða tikin fyri umhvørvinum.



Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

Tórshavn Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

Norðoyggjar Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

Suðuroy tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

*Haldarar, sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*